

## Byggifrøðingur

Í sambandi við, at ein byggifrøðingur er farin í farloyvi, verður søkt eftir avloysara til Húsaumsitingina.

**Arbeiðsøki**

- at vera við í arbeiðinum at umsita kommunalar bygningar
- at skráseta bygningar
- at gera útbjóðingartilfar í samband við umvælingar og viðlíkahald av bygningum
- at hava eftirlit við arbeiðum
- at luttaka í ymsum arbeiði á deildini

**Førleikakrøv**

- tú skalt hava útbúgving sum byggifrøðingur, og tað er ein fyrimunur, um tú ert lærdur húsasmiður
- royndir við tekning í AutoCad, útbjóðing og eftirliti við arbeiðum
- førleika á brúkarastøði í niðanfyri nevndu forritum, sum kommunan brúkar
- tú skalt hava koyrikort

Húsaumsitingin brúkar telduforritið Caretaker til skráseting av kommunalum bygningum, og kemur framyvir eisini at brúka skipanina til viðlíkahaldsarbeiði. Harumframt verður arbeitt við word, excel, MS Projekt, AutoCad, Microstation og Navision.

**Setanarviðurskifti**

Starvið verður sett skjótast møguligt eftir sáttmála millum Føroya Byggifrøðingafelag og Fíggjarmálastýrið. Starvið er fulltíðarstarv.

**Meira fæst at vita**

Um starvið við at venda sær til Mikael Viderø, býararkitekt ella Harald Bjørgvin, leiðara fyri Húsaumsitingina, tlf. 30 20 10.

**Umsókn**

saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, FO-110 Tórshavn, í hendi seinasta lagið fríggjadagin 22. desember 2006. Merkið umsóknina „Húsaumsitingin“.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo/leysstorv**

**Tórshavnar kommuna**

# Íbúð í gerð til sølu

Frálík íbúð stødd 105 m$^2$ + 9 m$^2$ kjallararúm til sølu. Durur, køkur, WC, grovrúm, stova, 2 rúm (møguleiki fyri trimum rúmum), altan. Liggur Undir Gráasteini í Tórshavn og stendur til at verða liðug 8. juli 2007.

Myndir og nærri upplýsingar um byggiætlanina síggjast á www.kj-smid.fo.

Prísur:
Verður seld um hóskandi boð fæst.

**Áhugað kunnu ringja tlf. 31 76 40 eftir kl. 18.**



# Søkt verður eftir fólki

at gera reint í Spælistovuni á Toftum.
Reingerðin er 10 tímar um vikuna frá 15. januar 2007 at rokna.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og FKA.

Skrivligar umsóknir verða at senda til Nes kommunu, 650 Toftir, í seinasta lagi 10. januar 2007 kl. 12.

**Nes kommuna**



*Baby & Barnaútgerð*

## *Starv sum handilsleiðari*

***Til víðkað virksemið, verður søkt eftir leiðara at byrja skjótast gjørligt.***



Vit bjóða
- eitt áhugavert og spennandi starv, har tú fært møguleika at seta tín dám á
- eitt starv í stimbrandi umhvørvi
- eitt avbjóðandi starv við nógvum skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir

Vit vænta, at tú
- hevur leiðsluroyndir
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og takað avgerðir
- dugir væl at samskifta
- dugir væl at selja
- hevur teldukunnleika
- ert røkin



Umsøknin skal verða okkum í hendi í seinasti lagi 30 desembur, viðmerkt starv og sendast til Niels Finsensgøtu 12 - 100 Tórshavn

Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo

Internet

Sosialurin
www.sosialurin.fo





# Hús í Miðvági til sølu

Sera gott útsýni. Húsini liggja gott og frítt fyri. Innrættað er í kjallaranum og garaga.
Beint yvir av Bónus og Keypsamtøkuni.

**Tlf. 217300**
**www.ognir.fo**



# *Hús í Kollafirði til sølu*

Húsini eru uml. 90 fermetrar, beton og kløðd við timbur og takt við aluman.

Húsini er bygd í 1965/66.

Loftshæddin er 4 kømur, 3 goymslurúm og gongd.

Miðhæddin er køkur, 2 stovur, kamar, baðirúm, gongd og trappuuppgongd.

Harafturat er altan uppá uml. 22 fermetrar.

Kjallarin hevur verið brúktur sum handil, har er eisini kontór, fýrrúm/vaskirúm og trappuuppgongd. Harafturat er ein uppíbygningur uppá uml. 21 fermetrar sum er brúktur til goymslurúm.

Grundøkið er góðar 500 fermetrar.

Ognin hevur góð parkeringsviðurskifti, og er tí væl egnað til handilsvirksemið/útleigan.

Ognin verður seld um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 421585 ella 277685**